# Bilar

**Magnus Gunnarsson**
*maggi@sosialurin.fo*



# Góðar umstøður til elbilar

Eftir ráðstevnuna um elbilar, sum Elfelagið SEV saman við Jarðfeingi skipaði fyri í Norðurlandahúsinum týsdagin 15. februar, hevur elbilabólkurin hjá SEV gjørt sína eftirmeting.

Á ráðstevnuni søgdu fundarluttakarar úr Føroyum, Danmark, Íslandi og Grønlandi sína hugsan og greiddu frá sínum royndum og framtíðarætlanum við elbilum. Har komu nógv ymisk sjónarmið fram um bæði fyrimunir og vansar við elbilum undir núverandi umstøðum.

Elbilabólkurin staðfestir, at tað eru nógv ymisk ting, sum mugu koma upp á pláss, um vit ynskja at geva elbilum góðar umstøður í Føroyum. Í okkara grannalondum verða t.d. løðistandarar settir upp og battaríiskiftistøðir etableraðar í býunum.



*Parkeringspláss við løðistandara*
*Mynd: Finn Jakobsen*



*Johan Mortensen og Magnus Magnussen frá elbilabólkinum hjá SEV*

Almennir stovnar sum Vinnumálaráðið, Innlendismálaráðið og Fíggjarmálaráðið eiga at ganga á odda og endurskoða alla løggeving, sum hevur við elbilar at gera. Sum dømi kann nevnast, at vegskatturin er munandi hægri fyri elbilar enn fyri bensin- ella dieseldrivnar bilar.

Hvussu er við trygging av elbilum. Ein stórur partur av bilinum er battaríið, umleið 40-50 prosent av kostnaðinum. Er bilurin vrak, um skaðin ger, at battaríið ikki kann nýtast aftur?.

Eisini mugu frámerki gerast, so at politi, sjúkraflutningstænasta og sløkkilið lætt finna út av, at tað er ein elbilur, sum er íblandaður eitt ferðsluóhapp ella líknandi. Har eru heilt onnur atlit at taka, um t.d. klippast skal í bilin. Á vanligum bilum er elektriski streymurin 12 volt, meðan streymurin í elbilum er um 300 volt.

Helst eru tað eisini fleiri onnur atlit at taka, men hetta vóru so tey fyrstu, sum vit hava lagt til merkis. Vónandi eru tað fleiri persónar, sum vilja gera sítt til, at vit fáa so góðar umstøður til elbilar sum gjørligt, siga limirnir í elbilabólkinum, sum vóna, at avvarðandi stovnar og politiski myndugleikin skapa greiðar og tryggar karmar fyri elbilar í Føroyum.

Í elbilabólkinum hjá SEV eru: Terji Nielsen, Magnus K. Magnussen, Dánjal Jógvan Hansson, Johan Mortensen, allir frá SEV, og Kári Mortensen frá Jarðfeingi.




*Parkeringsøki lagt av til elbilar*

Hósdagin 3. mars kl. 16.10

Í sendingini verður vitjað á asfaltfyritøkuni H.J. Asfalt í Klaksvík, har samrøður eru við Egil Johansen, fíggjarstjóra, og Hera Jacobsen, stjóra í fyritøkuni.

Bátaverksmiðjan AWI Føroyar hevur gjørt ein vaktarbát til Grønlands Fiskerilicenskontrol. Í hesum sambandi er samrøður við Eyðun Anthoniussen, stjóra í AWI Føroyum, og Hans Mølgaard skipara á bátinum. Eisini eru samrøður við Jákup Olsen frá HGV og Jóhan Henrik Olsen frá UniVice í Runavík, sum báðir hava leverað og installerað ymiskt til bátin.




Vinnu- & bílradío á Bás

# Frídøming til Toyota

Seinastu tíggju mánaðirnar hevur amerikanska NHTSA (Nation Highway Traffic Safety Administration), við hjálp frá verkfrøðingum frá NASA, framt nógvar rannsóknir fyri at finna møguligar, tøkniligar frágreiðingar um hví nakrir Toyota og Lexus bilar á amerikanska marknaðnum brádliga byrjaðu at økja um ferðina.

Amerikanski flutningsmálaráðharrin Ray Lahood hevur almannakunngjørt, at eingin tøkniliga grundað atvold er til óætlaðu ferðaøkingina í einum Toyota". Í almennari viðmerking sigur Toyota m.a. "Vit vóna, at hendan týdningarmikla kanningin er við til at steðga einum hvørjum iva viðvíkjandi elektronisku skipanunum í Toyota".

*Kelda: www.reyniservice.fo*